# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Smáligur almannapolitikkur

Tað er vælskiljandi, tá andstøðan á tingi tekur harðliga til orðana í sambandi við fyrstu kreppu-tiltøkini hjá ABC samgonguni. Hesi tiltøk eru sum so ofta í kripputíðum vend móti teimum veikastu í samfelagnum. Nú skal táttast í og farið verður eftir pensionistunum fyri at skerja almennu útreiðslurnar við umleið 20 milliónum. Talan er um at broyta nakrar almannalógir, løgtingslóg um umsorganararbeiði, løgtingslóg um almannapensjónir og løgtingslóg um áseting og javning av almannaveitingum. Her er við øðrum orðum talan um tríggjar tær mest týðandi almannalógirnar.

Tað hevur við verið ført fram, at her er bert talan um smærri upphæddir hjá tí einstaka pensionistinum, sum illa nokk fara at merkjast í gerandisdegnum. Tey, sum tala soleiðis, vita lítið um gerandisdagin hjá einum føroyskum pensionisti. Í áratíggjur hevur nú verið talað og skrivað um eina nútimansgerð av pensiónskipanini, men at kalla einki er hent. Vit hava fingið eina súmbolska hækking av samhaldsfasta, sum als ikki uppvegar tær príshækkingar, sum hava verið seinastu árini. Hetta mál snýr seg kanska ikki so nógv um sjálvar upphæddirnar men heldur um tann grundleggjandi hugburð, sum er aftan fyri slík uppskot sum hesi.

Tað tykist, sum kreppan er komin púrasta óvart á ABC samgonguna, hóast vit her í blaðnum eins og útlendsku sjónvarpsræsurnar í meira enn eitt ár hava borið tíðindi um tey alt meira týðuligu kripputekini, sum hava verið at hóma. Tá so samgongan raknar við, so tykist, sum hon reagerar í panikki uttan umhugsan. Tað tykist, sum tað í føroyskum politikki bert finst eitt svar til eina trupla fíggjar- og búskaparstøðu og tað er at tátta í. Hetta verður gjørt hvørja ferð tað dregur á luftina, hóast torført er at síggja, hvussu slík tiltøk skulu hjálpa annað enn at vísa, at ein so sanniliga er til reiðar at spara, so tað merkist.

Ætlaðu sparingarnar hava verið fyri hvøssum atfinningum frá Landsfelagnum og frá eitt nú Samtaki, ið tykist vera einasti stovnur, sum hugsar um okkara pensionistar, men tey tykjast tala fyri deyvum oyrum. Andstøðan og serstakliga formaðurin í størsta andstøðuflokkinum, Høgni Hoydal fanst í Rás 2 eisini hvassliga at framferðarháttinum í hesum máli. Uppskotini hava ikki verið til hoyringar hjá viðkomandi pørtum og myndugleikum, og uppskotini verða skrumblað ígjøgnum Løgtingið við at vikið verður frá vanligum galdandi tíðarfreistum. Tíðarfreistirnir eru fyri at tryggja, at eitt mál fær gjølla viðgerð og at alt verður eftirkannað. Tað er marghháttligt, at tað skal vera so umráðandi fyri ABC samgonguna at taka 20 milliónir frá føroyskum pensionistum, at neyðugt er at víkja frá tíðarfreistunum. Hetta er ómoralskt, og ABC eigur at taka uppskotini aftur og savna orkuna um ein miðvísan og vinnurættaðan kreppupolitikk heldur enn at koma við illa umhugsaðum lappaloysnum.

**Sosialurin**

## Koppingarevni móti krabbameini

**HELGI ABRAHAMSEN**



Eitt uppskot um at geva ókeypis tilboð um koppseting móti lívmóðurhálskrabba, liggur í løtuni í Løgtinginum. Nakað av blaðskriving hevur verið um uppskotið, og fólk hava víst á, at vit kunnu ikki lata vera við at taka undir við tí.

Í nógv ár hevur verið bíðað eftir einum koppingarevni ímóti krabbameini og tá tað fyrsta av slagnum nú endiliga er komið á marknaðin, vildi tað verið stórt spell, um vit, vegna sparingar, ikki gjørdu brúk av tí.

**Illa fyrireikað uppskot**

Nevnda uppskotið er eitt uppskot til samtyktar, sum biður løgtingið heita á landsstýrið, um at gera eitt nýtt uppskot um neyðugar lógarbroytingar, sum skulu gera tað møguligt at geva ungum gentum tilboð um ókeypis koppseting móti lívmóðurhálskrabba.

Men hvørjar lógarbroytingar skal landsstýrið gera? Tað finst eingin lóg, sum forðar fyri ókeypis koppseting móti lívmóðurhálskrabba. Tað einasta sum skal til, er ein játtan á fíggjarlógini, og ein kunngerð frá landsstýrismanninum. Tí gevur tað onga meining at løgtingið samtykkir at heita á landsstýrið, um at gera neyðugar lógarbroytingar - tá ongar lógarbroytingar eru neyðugar.

Tað sum skal til, er ein játtan á fíggjarlógini, og hana kunnu vit fáa til vega, tá fíggjarlógin kemur til aðru- ella triðju viðgerð. Men aftur her: Tað mangla pengar, millum annað tí at tríggjar milliardir eru tveittar burtur. Tað skuldi gera føroyingar meira frælsar. - Hvar er nú hatta frælsið?

## Friðing av Koltri

**SÍMUN MITTÚN**
smittun@email.fo

Eg havi fyrr, í lesarabrævi her í blaðnum, mælt til at Koltur verður friðað fyri seyð og húsdjór annars.

Hetta hevur ikki eydnast, serliga tí, at festari var harúti, men nú er so tað hent, at verandi festari fer í annað starv og hevur, sambært fjølmiðlunum, sagt garðin frá sær.

Nú er tí lagamanni at seta nevndu friðing í verk.

Eg fari tí, at heita á landsstýrismannin í búnaðarmálum at taka hetta mál upp beinan vegin. Eitt mál, ið vil verða til stórt gagn fyri allari gransking í Føroyum innan plantu- og fuglalív, jarðarslit v.m.

Gerið nú nakað við hetta!

## Sparingar raka skeivt

**LANDSFELAG PENSJÓNISTA OG SAMTAK**

Tað er uttanfyri alt mark, tá samgongan viðgerð stórmál, sum hava týdning fyri tey veikastu í samfelagnum, og bert nýtir ein dag til viðgerðina.

Í løgtinginum í gjár vóru 3 mál, ið raka pensjónistar og fyritíðarpensjónistar meint. Uppskotini eru ikki send til hoyringar hjá nøkrum parti, og hartil verður víkt frá øllum tíðarfreistum í løgtinginum, so uppskotini kunna lýsast í morgin – 12. Desember.

Tað er greitt, at við eini slíkari tíðarfreist, so eru stundir ikki at viðgera uppskotini og avleiðingarnar av teimum út í æsir, hóast hesi mál hava stóran týdning fyri pensjonistar, ið fáa stuðul til heilivág og fyri pensjonistar, ið njóta gott av dagtilhaldunum. Pensjónistar og fyritíðarpensjónistar vera eisini fátækari í 2009 í mun til 2008, tí viðbøturnar verða einans javnaðar við 3% og ikki 4%. Skuldi pensjónin og fyrtíðarpensjónin staðið mát við stóra prísvøksturin í 2008, áttu tær í øllum føri at verið javnaðar við 6%.

Landsfelag Pensjónista og Samtak halda, at arbeiðshátturin bæði hjá landsstýri og løgtingi er ógvuliga ódámligur, og tað er ikki sørt av vanvirðing, ið samgongan vísir pensjónistum og fyritíðarpensjónistum við hesi viðferð.

Eisini undrast feløgini á, at sparitiltøk landsstýrisins fyrst skulu raka teir veikastu bólkarnar í samfelagnum.

Tað hevur verið stór framgongd í Føroyum seinastu árini, men tað eru verri enn so allir bólkar í samfelagnum, ið hava fingið lut í framgongdini.

Tað er hugstoytt, at landsstýrið fyrst leggur eftir pensjónistum og fyritíðarpensjónistum við at skerja umsorganararbeiðið, almannapensjónir og almannaveitingarnar.

Fyri samlaða landsbúskapin er sparingin 10 mió kr, hetta er í mun til fíggjarlógina ein lítil dropi, men fyri tey fólk sparingin rakar kann hetta hava víðtøknar avleiðingar.

Landsfelag Pensjónista og Samtak heita fyrst og fremst á landsstýrið um at taka hesi uppskot aftur, og í øðrum lagi á løgtingið at fella hesi uppskot.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen
karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo
Bergur Johannesen bergur@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13$^{30}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.